Vælkomin til

Landsstevnu hjá Bláa Krossi

24. og 25. maj 2008

í missiónshúsinum og kirkjuni á Toftum.

Evni: Blái Krossur í dag og framyvir

Leygardagur 24. maj

10.00 **Koma og drekka**
10.30 **Andakt og bønarløta**
11.00 **Orðaskifti við Eyðgunn Samuelsen, *býráðslimi og løgtingskvinnu*, og Bill Justinussen, *løgtingsmanni***
"Hvørja ábyrgd hevur samfelagið til tess at tryggja børnum og ungum ein rúsfrían uppvøkstur?"
Høvi verður at seta spurningar
Løgtingstrio syngur
12.30 **Døgurði**
14.00 **Pallborðsfundur: Blái Krossur í dag og framyvir**
Í pallborðinum sita: Álvur Højgaard, *landsnevndarlimur*, Bogi Olsen, *lokalnevndarlimur*, Beinta Gregersen, *leiðari fyri Húsinum*, Martin Kúrberg, *starvsfólk á Blákrossheiminum*, Jákup Suni Lauritsen, *borgarstjóri*
15.30 **Drekka**
16.00 **Aðalfundur**
Skrá sambært viðtøkum felagsins
1. Orðstýrari og skrivari verða valdir.
2. Frágreiðing frá arbeiðinum og framtíðarætlanir.
3. Leggja fram góðkendan roknskap.
4. Kunna um fíggjarætlan og fíggjarviðurskifti.
5. Velja landsnevndarlimir.
6. Innkomin mál.
7. Velja grannskoðara.
8. Ymiskt.

18.00 **Nátturi**
19.00 **Blái Krossur – ein altjóða hjálparfelagsskapur**
Heidi Westborg Steel, altjóða samskipari hjá Bláa Krossi í Noreg
Olga Magnussen, leiðari á Blákrossheiminum
Sølva Ford syngur
Høvi verður at seta spurningar
21.00 **Ungdómstiltak "Ung og rúsur"**
Taborkórið syngur
Innsavnan til BKU

Sunnudagur 25. maj

11.00 **Gudstænasta við altargongd í Fríðrikskirkjuni**
Sverri Steinhólm, formaður í Bláa Krossi Føroya, prædikar
14.00 **Familjumøti**
Mariann Dj. Poulsen talar
Drama
Drekka
18.00 **Kvøldseta**
Tórhild Bjarkhamar talar
Evni: Tú ert dýrabarður
Effata syngur
Avvarandi sigur frá um at vaksa upp í heimi við rúsdrekkatrupuleikum
Tofta Blákrossfelag 100 ár
Innsavnan til Blákrossarbeiðið
Nátturi

Øll tiltøkini eru almenn, men á aðalfundinum leygardagin kl. 16.00, hava bert blákrosslimir atkvøðurætt.

Máltíðir: Tann, ið ynskir døgurða ella nátturða leygardagin, má tekna seg frammanundan á skrivstovu felagsins tlf. 470 700 í seinasta lagi mikudagin 21. maj 2008. Annars er ikki neyðugt at boða frá luttøku.

Barnaansing: Vit skipa fyri barnaansing leygardagin, við ymiskum virksemi, undirvísing, ítrivi o.ø. meðan tiltøk eru fyri vaksin.

KREA

Blái Krossur Føroya

Blái Krossur Føroya. Heiðavegur. 620-Runavík.
Tel 470 700. Faks 470 701. blakross@blakross.fo. www.blakross.fo

Blái Krossur Føroya er ein kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur, ið hevur til endamáls, við Guds og hansara orðs hjálp, at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríðari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi og at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

Pedagogar og hjálparfólk til Fuglafjarðar

Pedagogar og hjálparfólk
Søkt verður eftir pedagogum og hjálparfólkum til vøggustovu, barnagarð og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu.

- Eitt pedagogstarv á 30 t. viku í barnagarðsstovu
- Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í vøggustovu
- Eitt hjálparfólkastarv á 20 t. viku í vøggustovu
- Eitt pedagogstarv á 35 t. viku at arbeiða við sertørvi í stovnum hjá Fuglafjarðar kommunu

Størvini verða sett frá 01.08.2008 ella eftir nærri avtalu.

Tíðaravmarkað størv í vøggustovu vegna barnsferð.

- Eitt. pedagogstarv á 30 t. viku í tíðarskeiðnum 01.08.2008 til og við 31. 01.2008
- Eitt hjálparfólkastarv á 30 t. viku í tíðarskeiðnum 01.08.2008 til 30. 04. 2009

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Frá 01.08.2006 er dagstovnurin ætlaður 76 børnum, tí at stovnurin varð víðkaður við eini barnagarðsstovu.

Vit sóknast eftir pedagogum og hjálparfólkum:
- ið kunnu arbeiða sjálvstøðugt, og eru før fyri at orða seg væl skrivliga
- hava fakliga vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðinum
- hava umsorgan fyri børnunum
- eru eldhugað og jalig
- hava góð samstarvsevnir
- síggja møguleikar fram um mørk

Vit kunnu bjóða tær:
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- eitt starv, har tú kanst brúka tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- samstarv við NSR tænastu, náms- og sálarfrøðilig ráðgeving, sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu

Setanartreytir
Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í dagstovninum Julionnu Næs á tlf 737780.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera Býráðskrivstovuni, Norður í Gerði 10b, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi 2. juni 2008.

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 23. Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjarðar kommuna

Lesið Sosialin

Ársaðalfundur

verður Mikukvøldið 28. mai 2008 kl. 19.00, í Frískúlanum í Havn, undir Borgarhálsi 44, Velbastaður.

Skrá sambært viðtøkum.

Áhugað eru vælkomin at tekna seg sum lim í áhugabólkinum.

Sí heimasíðu okkara: www.friskulin.org.